## Dreymurin er veruleiki

Havant and Waterlooville venjarin, Shaun Gale ásannaði í dag, at dreymurin er veruleiki, eftir liðið úr Hampshire, ið dagliga spælur í Blue Square South deildini, ið er ein av non-league liðunum, vunnu sær rættin til ein dreymadyst móti Liverpool á Anfield í næstu viku. Hampshire felagið spæla móti Rafael Benitez og hansara monnum, næsta leygardag, eftir at teir vunnu móti Swansea City FC, við 4-2 sigri í gjárkvøldið, tá teri spældu umdyst í triðja umfari av FA Cup. Tað er ein ómetaliga góð kensla, eg nú havi. Mínir spælarar vóru heilt fantastiskir, sigur Havant&Waterlooville venjarin, Shaun Gale.

Kyndil-VÍF 30-27 (18-15)

# Kyndil vaskaði talvuna reina

**Kyndil hevði vitjan av VÍF í gjárkvøldið, og tað sást á øllum brøgdum, at Kyndlakvinnurnar høvdu eittans mál í huganum, at reinsa talvuna reina, tí seinast VÍF var á vitjan, var talan um avsmurning. Hesaferð vann Kyndil við trimum málum**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Kyndil byrjaði betur í Høllini á Hálsi í gjárkvøldið, tá tær høvdu vitjan av VÍF. Kyndil vann dystin við trimum málum, 30-27, eftir hálvleikstøðuna 18-15.

### Keðilig gongd hjá VÍF

Vestmannakvinnur høvdu óivað ætlað sær eitt betur útfall, enn tað tær fingu í gjárkvøldið. Teimum høvdu óivað kunna hugsað sær eitt líknandi úrslit, og tað tær fingu 21. november, tá tær sorlaðu Kyndil heili 30-16.

Síðan tann dystin hevur gingið, snøgt sagt av skriðuni til hjá VÍF. Tær hava tapt fýra dystir á rað, og tað sær ikki ov væl út, tá nú bæði Kyndil og StÍF eru byrjaði at stjala eitt stig her, og annað har. Tá er skjótt at gerast eftirbátur í botnstríðnum. Tær mugu til at vinna sær okkurt stigið skjótt.

Sum nú er, er VÍF á 5 stigum fyri 12 dystir, meðan StÍF er á 7 stigum, fyri bert 11 dystir. Kyndil kom við sigrinum í gjár uppá 9 stig fyri 12 dystir, so tær hava fingið eitt sindur av luft undir veingirnar.

### Kyndil vísir góðar taktir

Kyndlakvinnurnar vóru ongantíð í veruligum vanda fyri at missa dystin, og harvið kærkomnu stigini av hondini.

- Vit byrja væl og hava í veruleikanum fulttamarhald á dystinum allan vegin, hóast VÍF eitt skifti kom dekan ov nær. Men tá okkara halda á fram at skora, samstundis sum at verjan stendur stinn, og at vestmannakvinnur byrja at virka sløsutar í avslutningunum, er sigurin okkum vísur, sigur Randi Wardum, ið fyri stuttari tíð síðan byrjaði aftur. Hon hevur annars verið ein av berandi kreftunum saman við Jóruni Ludvík, og Linu Andriulyte, men hon hevur ikki havt tíð til hondbólt fyrr í ár.

Nú er hon so við aftur, og gongur tað líka væl, og kanska eitt sindur betur, hava tær ein góðan møguleika til at vinna seg orduliga sikrar frá botninum.

Hvussu er og ikki, verður spennandi at fylgja gongdini hjá hesum báðu, fyrr so sigursvandu liðum.



### FAKTA

**Kyndil-VÍF 30-27 (18-15)**

**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Randi Wardum 8 (3), Jacklin Durhuus 6 (1), Barbara Egilstrøð 5, Tordis Tróndarson 4, Lina Andriulyte 2 (1), Ása Apol 2, Súsanna Petersen 1, Bjørg Syderbø 1, Eyðritt Andreassen 1 (1)
**VÍF:** Liljan Durhuus 7, Ioana Rapa 7, Heidi Joensen 5, Rannvá á Rógvu 3, Torgunn Johansen 3, Linda Johannesen 1, Marita Johannesen 1, Finngerð Jensen 1
**Brotskøst:** Kyndil 11, VÍF 6
**Útvísingar:** Kyndil 4, VÍF 3
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen&Dánial Samuelsen

# Triðja steypafinala hjá Bárði

**Sunnudagin verður steypafinalan í flogbólti í Danmark spæld í Odense Idrætshal. Og verður hon send beinleiðis á TV2 Sport kl. 14. Og føroyskt íslett verður at síggja**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Føroyski Bárður Bendix Mikkelsen er ikki ársungi innan flogbólt. Sunnudagin verður tað triðju ferð, at Bárður er í donsku steypafinaluni. Hinar báðar finalurnar vóru afturi í 2001 og 2002, tá Bárður spældi við Holte IF. Bæði hesi árini var mótstøðuliðið Aalborg HIK, og hesi árini vann hann ávíkavist silvur og gull heiðursmerki.

### Lokalbrak á Fjóni

Middelfart VK, ið Bárður umboðar, skulu møta favorittunum Marienlyst Odense Volley, so talan verður um eitt satt lokalbrag á Fjóni. Seinast liðini møttust var nýggjunda januar, og tá vunnu Bárður og liðfelagar hansara, heldur óvænta, 3-0 á útivølli móti Marienlyst. Bæði liðini hava havt eitt hart program her í januar mánað, so tað verður spennandi sunnudagin um allir verða heilt klárir til finaluna. Skaðar hava millum annað gjørt um seg á báðum liðunum.

- So seint sum í gjár leiktu vit ein harðan dyst heima móti Aalborg HIK, har vit megnaðu at vinna 3-0. Men dysturin merkis í fótinum hjá mær í dag. Havi tann síðsta mánaðin havt ein lítlan skaða í vinstra føti, sigur Bárður.

### Vegurin til finaluna

Vegurin hjá Middelfart til finaluna hevur verið harður. Fyrst á útivølli í áttandapartsfinaluni móti Randers VK, har Middelfart vann 3-1, og síðani aftur á útivølli í fjórðingsfinaluni, tá teir møttu Lyngby Volley. Í Lyngby vunnu Bárður og liðfelagar hansara 3-0, og so var lagt upp til ein spennandi dyst í Middelfart, har Aarhus Volley skuldu koma á vitjan í hálvfinaluni. Dysturin bleiv eisini spennandi, men Middelfart VK drógu frá og vunnu 3-1, og so var finalusessurin tryggjaður.

Aarhus Volley er annars liðið, ið Joana S. Joensen, av Tvøroyri, spældi við, tá hon var í Danmark í lestrarørindum.

### Marienlyst eru favorittar

Marienlyst Odense Volley eru smáfavorittar til finaluna sunnudagin, og hetta kemst óivað av at teir liggja sum nummar eitt í elituseriuni í Danmark. Nummar tvey eru gamaní Middelfart VK, men sum oddalið hava Marienlyst liðið ein lítlan favorittstatus til finaludagin.

Marienlyst hava spælt 10 dystir og hava bert tapt tann eina, og tað var móti júst Middelfart. Middelfart hinvegin, eru fýra stig aftanfyri, á øðrum plássi. Teir hava somuleiðis spælt 10 dystir, men hava tapt trýggjar av teimum. Beint í hølinum á Bárði og liðfeløgum hansara liggur Gentofte Volley, bert tvey stig aftanfyri. So spennandi verður at fylgja við, hvussu leikur fer. Hiðani verður í øllum førum ynskt Bárði alt tað besta, eina góða finalu, og góðan byr framyvir.

### FAKTA

**Vegurin hjá finalistunum til finaluna:**

**Middelfart VK (Við Bárður Bendix Mikkelsen á liðnum):**

| | | |
|---|---|---|
| Randers VK (Útivøllur) | 3-1 | (21-25, 9-25, 25-19, 15-25) |
| Lyngby Volley (Útivøllur) | 3-0 | (15-25, 15-25, 20-25) |
| Aarhus Volley (Heimav.) | 3-1 | (25-17, 25-14, 22-25, 25-20) |

**Marienlyst Odense Volley:**

| | | |
|---|---|---|
| Midtfyns VK (Útivøllur) | 3-0 | (19-25, 15-25, 27-29) |
| Aalborg HIK (Útivøllur) | 3-0 | (16-25, 21-25, 14-25) |
| Gentofte Volley (Heimav.) | 3-1 | (25-23, 25-16, 22-25, 25-20) |

### FAKTA

**Støðan í Elituseriuni í Danmark:**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Marienlyst | 10 | 9 | 0 | 1 | 27-7 | 18 |
| 2 | Middelfart VK | 10 | 7 | 0 | 3 | 23-10 | 14 |
| 3 | Gentofte Volley | 10 | 6 | 0 | 4 | 23-14 | 12 |
| 4 | Aalborg HIK | 10 | 4 | 0 | 6 | 16-21 | 8 |
| 5 | Aarhus Volley | 9 | 4 | 0 | 5 | 13-20 | 8 |
| 6 | Hvidovre VK | 9 | 2 | 0 | 7 | 9-22 | 4 |
| 7 | ASV Århus | 10 | 2 | 0 | 8 | 8-25 | 4 |